gult cyan magenta svart



# Føroya Banki 289 mió. kr í klokkureinum yvirskoti

**Ársrokniskapurin hjá Føroya Banka fyri í fjør vísir eitt yvirskot áðrenn skatt upp á 328 mió. kr. Hetta er ein framgongd upp á 30 prosent í mun til í fyrrárið. Síðan bankarnir vóru lagdir saman í 1994 hevur Føroya Banki havt eitt samanlagt avlop upp á 1,850 mió. k. áðrenn skatt.**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



Jørgen Astrup, forstjóri í Føroya Banka sigur, at tað finast tríggjar orsøkir til góða útslitið í ár.

– Føroya Banki hevur rættuliga fitt av peningi, sum ikki er útlántur og hendan hava vit sett í obligatióna og pengamarknaðin. Tá so rentan hækkar, so fáa vit knappliga størri avkast av hesum pengum. Hetta er ein forkláring upp á góða úrslitið, sigur Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka.

– Næsta forkláringin er, at vit hava havt færri rakstrarútreiðslur á hvørjum ári síðan bankarnir vóru lagdir saman í 1994. Tá tú hevur færri útreiðslur, samstundis sum forrætningin í bankanum veksur, so fær tú eitt størri yvirskot. Vit hava megnað at rationalisera raksturin av bankanum, samstundis um tey heilt tungu lánimálini, ið vit arvaðu, eru vorðin færri og lættari at umsita. Vit kunnu í dag reka bankan bíligari, sigur Jørgen Astrup Hansen.

– Triðja orsøkin er, at vit aftur í ár hava megna at afturført burturleggingar. Hetta hevur ávirkað tap og burturleggingar fyri skuldarar rakstur bankans fyri í fjør við 171 mió. kr. Ein øgiliga stór upphædd varð nýtt til burturleggingar í 1992 og 1993 og rokniskapurin hjá okkum í ár vísir, at hesar burturleggingar er ikki bara mistur peningur. Vit hava fingið 171 milliónir aftur av hesum gomlu burturleggingum, sigur Jørgen Astrup Hansen.

– Vit eru ógvuliga fegnir i bankanum fyri útslitið í ár, sigur hann.

### Við í vinnulívinum

Føroya Banki hevur økt útlánið við 16 prosentum í fjør og Astrup letir væl at gongdini í vinnulívinum.

– Virksemið í vinnulívinum er stórt. Vit hava fingið kapping á vinnulívsøkinum við tað at Sparikassarnir nú eisini eru farnir at fíggja vinnulívið. Hetta merkja vit sjálvsagt.

Fiskivinnan hevur tað eisini gott sætt við Bankans eygum. Tað vil siga partar av fiskivinnuni.

– Ørsøkin til at tað gongur gott hjá bankanum er, at tað gongur gott í fiskivinnuni. Sjálvandi hava ikki øll í fiskivinnuni somu kor at arbeiða undir. Viðurskiftini hjá langfaratrolarunum eru ikki heilt tey somu sum hjá nótabátunum og skipunum heima, men gjøgnumgangandi so gongur tað væl, sigur Jøgern Astrup Hansen.

– Vit halda eisini at fiskivinnan er vorðin sunnari. Vit halda, at eginpeningurin fyrr var alt ov lítið í vinnutólum. Hendan gongdin er vend nú og hóast vit ikki hava nakað fast krav til hvussu stórur eginkapitalurin skal vera í eitt nú einum skipi, so eru krøvini munandi strangari nú enn fyrr, sigur Jørgen Astrup Hansen.

Nýggjasta skipið í flotanum, rækjutrolarin Ocean Pride, sum kom til landið mikudagin, hevur ein eginpening upp á 24 prosent. Fyri 10 árum síðan var kravið ongantíð meira enn 10 prosent og hesi vóru sjálvdan dokumenteraði sum veruligur peningur og komu sostatt at tyngja raksturin av skipinum. (red.)

– Tað er ikki bara fyri bankans skuld, at vit krevja meira eginpening, sum vanligt var fyrr. Gongur nakað galið og ongin eginpeningur er tøkur, so missa eigararnar vinnutólið, har er einki at standa ímóti, sigur Jørgen Astrup Hansen.

– Vit hava eitt nógv sunnari vinnulív í dag enn fyri 10 árum síðan., sigur hann.

### Ov høgt trýst

Jørgen Astrup Hansen heldur, at hóast tað gongur væl í Føroyum nú, so er dekan og nógv trýst í ketlunum í løtuni og skipagott hevði verið at minka um trýstið.

– Onki arbeiðsloysi er í landinum og tað kann vera vandamikið. Fer hitin í ketlinum yvir 100 prosent, so byrjar vatnið at kóka og tað um reppið nú. Vit kunnu sum banki ikki gera nakað við, at fólk hava nógvan pening um hendir, vit kunnu jú ikki krevja skatt inn, sigur hann.

– Men eg haldi ikki, at vit kunnu samanlíkna heilt við áttatiárini, hóast vit stúra eitt sindur, um gongin heldur fram óbroytt. Vinnulívið og vanliga húsarhaldið er ikki so tyngt av lánum, sum tað var í áttatiárunum, heldur ikki bankarnir. Omaná hetta fingu vit eina fíggjarkreppu, sum eg avgjørt ikki rokni við endurtekur seg nú, soleiðis sum útlitini eru, sigur Jørgen Astrup Hansen.

– Men útlitini eru bara góð, um vit klára at halda javnvág. Um ein heldur fram at leggja brenni undir ein búskap, har onki arbeiðsloysi er, so verður galin endi, tað kann eg vissa fólki um, sigur hann

– Tó vit eru sterkari í dag. Bankin fer ikki á húsagang, sum vit fáa eitt afturstig, sum hendi fyri tíggju árum síðan. Rokniskapurin sýnir at bankin er sterkur, sigur stjórin í Føroya Banka.

Føroya Banki heldur aðalfund 28 mars. og nevndin hevur góðkent rokniskapin.

## FISKIVINNUTÍÐINDI

## Norskir línubátar undir Føroyum

Átta norskir línubátar royna í løtuni undir Føroyum. Teir royna fyri tað mesta sunnanfyri, suður móti bretska markinum og so eisini vestur av Føroya Banka. Hetta er besta tíð hjá norsku línubátunum undir Føroyum, og teir royna altíð at vera klárir til fiskiskap longu 1. januar.

Ein norskur línubátur, sum roynir vestanfyri misti ein bjargingarbát í morgun. Teir boðaðu myndugleikunum frá, tí hesin kundi vera til ampa fyri siglandi skip.

**13 bátar avreiddu góð fýra tons til gólvsøluna hósdagin**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 25 | MASCOT | LÍNA | 824 |
| FD 306 | VESTURLAND M/S | GØRN | 380 |
| FD 339 | NEPTUN | SNELLA | 61 |
| FD 580 | THOMAS NYGAARD | LÍNA | 251 |
| FD 588 | FUGLTÚGVAN | LÍNA | 208 |
| FD 992 | KÚRBERG | LÍNA | 1.307 |
| FD1000 | SMARAGD | PARTROL | 55 |
| FD1160 | BRILLANT | PARTROL | 102 |
| KG 244 | ÅGOT | LÍNA | 163 |
| KG 473 | NÚPUR | LÍNA | 219 |
| KG 476 | PISON | LÍNA | 184 |
| KG 9 | KLAKKUR | LÍNA | 173 |
| TG 340 | SANCY | BOTNTROL | 192 |

## Keypir týskan upsa

Nakað av upsa, sum útlendsk skip veiða verður landaður í Føroyum. Í farnu viku keypti Fiskavirking í Runavík tríggjar lastir upp á 100 tons hvør frá týskum trolarum. Hetta gevur fitt av arbeiði hjá Fiskavirking, veit FF blaðið at siga.

## Tjaldrið er nú farið út aftur

Tjaldrið, sum seinastu 14 dagarnar hevur ligið við bryggju í Havn, tí ongir stýrimenn hava verið tøkir. Nú eru so viðurskiftini í rætt lagi og Tjaldrið er farið út aftur. Meðan Tjaldrið hevur ligið, hevur danska verjuskipið einsamalt røkt uppgávurnar. Men ikki hevur verið nógv at gera, tí illa hevur viðrar og norðhavsróðurin hevur verið nógv tarnaður av veðri.

## Fekk løst umborð á línubáti

Tað hevur viðrað illa undir Føroyum seinastu tíðina og javnan hevur hann meldað upp í storm. Skiparin á klaksvíkslínubátinum Kvikki fekk løstir í ódnarveðrinum. Hann hevði frívakt, tá skipið fekk eitt ordans slengr og hann varð sendur úr koyggjuni og fram á dúrkið. Hann brákaði trý rivjabein og fekk annars smávegis løstir.

## Russar søktu egnan trolara

Moskva(NTB-AFP)
Eitt flogfar frá russisku vaktartænastuni søkti í gjár ein russiskan trolara, sum royndi ólógliga við oyggjarnar Kurilene í norðara parti av Kyrrahavinum. Manningin á russiska trolaranum varð bjargað av einum russiskum vaktarskipi, skrivar Interseafood, no.

Varaleiðarin fyri vaktartænastuni har á leiðini, admiral Velerij Logvenenko, segði at trolarin Albatros 101 vildi ikki steðga, tá vaktartænastan vildi fara umborð at kanna skipið. Eftir at hava elt skipið í 23 tímar, sá vaktartænastan sær ongan annan møguleika enn at skjóta. Eitt flogfar loysti skot av og trolarin sakk. Manningin kom øll í bjargingarbátar og varð tikið upp av vaktarskipi.

## Norðmenn taka russar

Tromsø(NTB)
Norska vaktartænastan hevur seinastu vikuna tikið tríggjar russiskar trolarar, sum hava veitt ólógligt ella við ólógligum reiðskapi í norskum sjógvi. Mánakvøldið kom russiski trolarin »Soligalitsj« til Hammerfest eftir at verða tikin av einum norskum vaktarskipið við Bjarnoynna, skrivar norska útgávan av Interseafood.com.

Sambært politimeistaranum í Hammerfest, Kaare Sognstad er trolarin skuldsettur fyri at hava nýtt skiljiristina í trolinum á skeivan hátt.

Mánakvøldið vóru skipari og manning til avhoyringar hjá politinum.

gult cyan magenta svart



# Stuttligari enn skúlin

**Næmingar úr Ósáskúlanum fingu frí frá skúlanum, so teir kundu fara til arbeiðis. Tað dámdi teimum væl, tí tað eru pengar at vinna**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*



*Næmingar úr Ósáskúlanum standa væl bjálvaðir og flyta eskjur við surimi av transportbandi og yvir á plattar, sum síðani verða fluttir í frystigoymsluna hjá Northern Fish Cold Storage*

Risastóri svartkjaftatrolarin Næraberg liggur innast við vestaru kai í Klaksvík, og bæði umborð og á bryggjuni er nógv lív í.

Tað er hósdagur, og fólk eru farin undir at landa trolaran, sum hevur um 800 tons av surimi og um 300 tons av mjøli við til lands eftir besta túrin hjá skipinum higartil.

Við eitt transportband, sum flytir eskjur við surimi í land úr Næraberg, standa nakrir ungir mans.

Teir eru væl ílatnir, og fyri tað um krillutir blaðmenn og líknandi fólkasløg hava lítlan hug at verða út í bítandi kuldanum, standa teir hugaligir og væl bjálvaðir og flyta eskjurnar av bandinum og yvir á plattar, sum ein gaffiltrukkur liggur úti eftir.

### Úr skúla til arbeiðis

Skúlastjórin í Ósáskúlanum, Símun Petur Hjelm, gav í vikuni 45 næmingum, sum dagliga stríðast við 9. flokk, frí í tveir dagar, so teir kundu sleppa til arbeiðis.

Tað stendur á at finna nóg mikið av fólki, tá eitt stórt skip skal landast í skundi, og hesaferð avgjørdi skúlastjórin, at næmingarnir skuldu veita eina hjálpandi hond.

Bæði dreingir og gentur úr 9. flokki fóru til arbeiðis, og flestu teirra vóru sera hugalig.

– Hetta er stuttligari enn at ganga í skúla, tí vit fortjena pengar, tá vit eru til arbeiðis, sigur ein av næmingunum, meðan hann flytir eina av hvítu eskjunum yvir á ein platt.

Er tað ikki kalt at vera til arbeiðis í hesum veðrinum?

– Hvussu er tað, tú ert ílatin, er spyrjandi svarið, sum skribenturin fær slongt aftur í høvdið.

### Aftur til fiskiskap

Næraberg hevur gjørt ein góðan túr hesaferð, og reiðaríið vil hava stóra trolan aftur til fiskiskap sum skjótast.

Tí hevur Northern Fish Cold Storage roynt at funnið so nógvar landarar sum gjørligt, so arbeiðast kann í vaktum, og skipið tømast eftir nøkrum døgum. Teir stívliga 40 skúlanæmingarnir koma væl í arbeiðnum.

Eskjurnar við surimi verða fluttar í frystigoymsluna, meðan sekkirnir við mjøli verða lagdir í bingjur.

Ætlanin er, at Næraberg skal fara aftur til fiskiskap leygarkvøldið, men um tað fór at eydnast at gera landingina lidna áðrenn leygarkvøldið, var óvist, tá vit vitjaðu á kaiini seinnapartin hósdagin.




